# Breiðband til allar borgarar í kommununi

**Nú hava borgarar í Nólsoy, Norðradali, Kirkjubø og Nólsoy møguleikan at tekna sær breiðbandhald til internetið frá Føroya Tele**

BREIÐBAND
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Andras Róin og Heðin Mortensen - saman við Hilmari Joensen, lærara í Nólsoy, sum umvegis telduna var við til hátíðarløtuna á borgarstjóraskrivstovuni í Havn í gjár, tá breiðbandið til Nólsoyar, Norðradal og Kirkjubø alment varð tikið í nýtslu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Okkara ynski er, at allir borgarar í kommununi skulu hava sama møguleika at útvega sær breiðhand internetsamband. Tí vendu vit okkum til Føroya Tele við ynski um, at borgarar í Tórshavnar Kommunu, sum búgva í Norðradali, Kirkjubø og í Nólsoy fingu møguleika tekna sær breiðbandshald.

Hetta segði Heðin Mortensen á samkomu á borgarstjóraskrivstovuni fríggjamorgunin, í sambandi við, at breiðbandsambandið alment varð tikið í nýtslu.

Heðin Mortensen sigur, at tað var eftir áheitan frá borgarum, at málið varð tikið upp.

- Við breiðbandi fáa borgararnir betri og skjótari internet. Við breiðbandi er skjótt og lætt at senda og fáa teldupost við myndum ella sjónbandaklippum, at heinta myndir ella forrit, at lurta eftir tónleiki ella at spæla, eins og heimasíðurnar koma skjótari fram, segði Heðin Mortensen.




United Seafood og Faroe Seafood løgdu saman fyrr í ár, og samanlagda felagið hevur eitt tað størsta KT-kervið í Føroyum. Øll virkini og allar deildirnar uttanlanda eru á sama neti, og røkkur hetta netið til í alt tíggju deildir, líka úr Vestmanna til Boulogne sur Mer í Fraklandi. Samanlagt eru yvir 100 brúkarar á netinum, og harumframt koma ymiskir terminalar og stýringar av Marel MPS skipanini. Alt hetta verður stýrt av høvuðsdeildini í Tórshavn, og ofta er eisini møguleiki at fara út á deildirnar at arbeiða. Brúkararnir á teldukervinum eru væl fyri á telduøkinum, og arbeiðsumhvørvið er sera positivt og dynamiskt.

STARVIÐ
- Dagligt support/brúkarahjálp har vanligir spurningar og trupulleikar hjá brúkarum verða loystir.
- Dagligur rakstur av og eftirlit við EDV-skipanunum.
- Tillaging og gerð av útskriftum og skermmyndum.
- Uppsetan og viðlíkahald av egin-teldunum o.ø. útbúnaði.
- Uppsetan og innkoyring av nýggjum EDV-skipanum.

UMSØKJARIN
Útbúgving sum t.d. Datamatikari ella IT-supportari, ella royndir innan KT sum geva samsvarandi førleika. Kunnleiki til Axapta, Netware, Groupwise ella Marel MPS er eisini ein fyrimunur. Góð samstarvsevni og førleika fyri at leggja egið arbeiði til rættis. Koyrikort er eisini eitt krav.

Vit kunnu bjóða eitt starv í mennandi og spennandi fakligum umhvørvi við møguleika fyri víðari menning á skeiðum o.l. Lønin verður avtalað eftir kvalifikatiónum.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Ynskja tit at fáa meir at vita um starvið, so kunnu tit seta tykkum í samband við Hans Blaasvær ella fara inn á heimasíðurnar www.united.fo ella www.faroe.com. Umsóknarfreistin er 17. oktober, og umsóknir skulu sendast til:

FAROE SEAFOOD

Faroe Seafood : Postsmoga 218 : 110 Tórshavn : att: Hans Blaasvær, KT-samskipari
Tel: 35 55 55 : Fax: 35 55 50 : E-mail: hans@united.fo

# Tolið verður ikki so hart troytt longur

**- Hetta er fantastiskt, nú gongur internetið so nógv skjótari, sigur Hilmar Joensen í Nólsoy**

BREIÐBAND
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hetta segði Hilmar Joensen, lærari í Nólsoy, sum umvegis internetið var við til hátíðarløtuna á skrivstovuni hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra í Havn fríggjamorgunin.

Á einum telduskíggja sást Hilmar, sum á sínum telduskíggja úti í Nólsoy eisini sá, hvat gekk fyri seg á borgarstjóraskrivstovuni.

Hann greiddi frá, at tey í Nólsoyar skúla hava 23 teldur til teir 30 næmingarnar. Enn vóru bara tvær teirra bundnar í breiðbandið, men har var stórur munur á, segði hann.

- Vit hava havt eitt 128 kb samband, og tað kann ikki samanmetast við hetta, segði hann, og legði afturat, at tolið nú ikki verður so hart troytt longur, nú tey sleppa frá at ringja upp til internetið - og so ikki minst allari bíðitíðini, tey sleppa undan.

Hilmar Joensen segði eisini, at fleiri nólsoyingar hava bíðað eftir breiðbandssambandinum, tí tað skapar aðrar møguleikar.

- Vit hava eitt nú fingið eina nýggja rætt her úti, har seyðurin gongur beinleiðis upp á vektina, sum so beinleiðis hevur samband við eina teldu, har allir upplýsingarnir verða goymdi. Ímyndið tykkum, hvussu skjótt hesir upplýsingar ikki kunnu brúkast til eitthvørt spennandi umvegis internetið, segði Hilmar Joensen.

Einir 50 nólsoyingar ferðast dagliga til Havnar til arbeiðis. Fleiri teirra kunnu nú umvegis breiðbandssambandið gera part av sínum arbeiði heimanífrá, eitt nú fólk við fyrisitingarligum uppgávum, sum í framtíðini fara at kunna hava nakrar arbeiðsdagar heima við hús.

- Jú, hetta gevur nógvar, spennandi framtíðarmøguleikar, var breið semja um á borgarstjóraskrivsovuni - og um breiðandið í Nólsoy.

# Breiðband um næstan alt landið

**Føroya Tele dekkar nú 94% av landinum við breiðbandi**

BREIÐBAND
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Tað kennist so løgið soleiðis at tosa gjøgnum eina teldu, eg kenni meg so fremmandgjørdan, helt Andras Róin, stjóri á Føroya Tele fyri, tá hann eisini tosaði við Hilmar Joensen í Nólsoy umvegis telduna á skrivstovuni hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra fríggjamorgunin.

Andras Róin sigur, at Føroya Tele nú dekkar 94% av landinum við breiðbandi.

- Málið er sjálvandi at dekka alt landið, og vit vænta, at innan næstu tvey árini eru vit komin upp um 96%, segði hann.

Hann sigur, at tað ikki bara er ein spurnigur um pengar, men at tað eisini er spurningur um orku hjá Føroya Tele at klára tað. Fyri at kunna veita breiðbandtænastu, so krevst at støðir verða settar upp, soleiðis at linjulongdin ikki er meira enn fýra kilometrar millum støðina og brúkaran.

Samanborið við donsk viðurskifti, so er Føroya Tele væl við í kappingini, tí meðan Danmark hevur 95% dekning av breiðbandi, so hava vit umleið tað sama - 94%.

Andras Róin sigur eisini, at Føroya Tele ikki hevur veitingarskyldu viðvíkjandi breiðbandssambandi. Tí nýtist teimum ikki at dekka øki, har tað handilsliga ikki kann betala seg.

- Men tað hevur nógv at siga fyri okkara image, at vit kunnu veita somu tænastur um alt landið, sigur Andras Róin.